## Ítrótturin um vikuskiftið:

**Fríggjadagin, 14. desember:**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| FLOGBÓLTUR | ÍF – SÍ | Kambsdalur | Klokkan 19.30 | Menn |
| FLOGBÓLTUR | ÍF – Dráttur | Kambsdalur | Klokkan 19.30 | Kvinnur |

**Leygardagin, 15. desember:**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| FIMLEIKUR | Estetiskur, steypak. | Kambsdalur | Klokkan 14.00 | Kvinnur |
| HONDBÓLTUR | Kyndil – StÍF | Tórshavn | Klokkan 17.00 | Kvinnur |

**Sunnudagin, 16. desember:**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| FLOGBÓLTUR | KÍF – Ternan | Kollafjørður | Klokkan 13.00 | Kvinnur |
| HONDBÓLTUR | VÍF – Neistin | Vestmanna | Klokkan 14.30 | Kvinnur |
| FLOGBÓLTUR | Fleyr – SÍ | Tórshavn | Klokkan 14.30 | Kvinnur |
| HONDBÓLTUR | VB – Stjørnan | Vágur | Klokkan 15.00 | Kvinnur |
| FLOGBÓLTUR | SÍ – Mjølnir | Sørvágur | Klokkan 15.00 | Menn |
| FLOGBÓLTUR | Mjølnir – TB | Klaksvík | Klokkan 15.00 | Kvinnur |
| FIMLEIKUR | Estetiskur, steypak. | Kambsdalur | Klokkan 15.00 | Kvinnur |
| HONDBÓLTUR | VÍF – Neistin | Vestmanna | Klokkan 16.00 | Menn |
| HONDBÓLTUR | KÍF – Team Klaksvík | Kollafjørður | Klokkan 16.00 | Menn |
| HONDBÓLTUR | Kyndil – StÍF | Tórshavn | Klokkan 16.00 | Menn |
| FLOGBÓLTUR | Fleyr – TB | Tórshavn | Klokkan 16.30 | Menn |

## StÍF I – Stjørnan 24-33 (9-18)

Dómarar: Heri Petersen og Dánjal Samuelsen

10 min.: 2-5
20 min.: 5-11
40 min.: 14-24
50 min.: 19-29

**StÍF I:** Fríðrún Danielsen 6, Bára Bertelsen 6, Birita Poulsen 5, Birna Tummasardóttir 2, Rebekka Justinussen 1, Mariann Petersen 1, Paula Høgnesen 1, Asgerð Káradóttir 1, Sunfríð Johansen 1.
**Stjørnan:** Valentina Suciu 6, Una Olsen 4, Anna Kristina Samson 4, Judit Hansen 4, Edith Hansen 4, Durita Mikkelsen 4, Sylvia Hansen 2, Bára S. Klakstein 2, Ella Petersen 2, Alina O. Anghel 1.
Útvísingar: StÍF I 2, Stjørnan 6

## Atlantic Airways Deildin *Menn*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNIN MÁL | TAPT MÁL | MUNUR | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Neistin | 13 | 463 | 356 | 107 | 25 |
| 2 | KÍF | 13 | 365 | 335 | 30 | 17 |
| 3 | VÍF | 13 | 359 | 324 | 35 | 14 |
| 4 | Kyndil | 13 | 334 | 328 | 6 | 14 |
| 5 | H71 | 12 | 311 | 314 | -3 | 12 |
| 6 | StÍF | 13 | 322 | 338 | -16 | 6 |
| 7 | Team Klaksvík | 11 | 238 | 397 | -159 | 0 |

## Sunset Deildin *Kvinnur*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNIN MÁL | TAPT MÁL | MUNUR | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Tjaldur | 13 | 371 | 293 | 78 | 21 |
| 2 | Neistin | 13 | 360 | 298 | 62 | 21 |
| 3 | Stjørnan | 12 | 359 | 284 | 75 | 20 |
| 4 | VB | 13 | 308 | 323 | -15 | 11 |
| 5 | Kyndil | 13 | 317 | 322 | -5 | 10 |
| 6 | VÍF | 13 | 298 | 364 | -66 | 6 |
| 7 | StÍF | 13 | 241 | 370 | -129 | 1 |

## Eik-ligan *menn*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNIÐ | TAPT | VUNNIN SETT | TAPT SETT | MUNUR | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | ÍF | 11 | 9 | 2 | 29 | 9 | 20 | 18 |
| 2 | SÍ | 10 | 8 | 2 | 26 | 7 | 19 | 16 |
| 3 | Mjølnir | 10 | 5 | 5 | 17 | 17 | 0 | 10 |
| 4 | Fleyr | 10 | 4 | 6 | 14 | 22 | -8 | 8 |
| 5 | TB | 11 | 0 | 11 | 2 | 33 | -31 | 0 |

## Eik-ligan *kvinnur*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNIÐ | TAPT | VUNNIN SETT | TAPT SETT | MUNUR | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | SÍ | 10 | 9 | 1 | 27 | 10 | 17 | 18 |
| 2 | Mjølnir | 10 | 8 | 2 | 27 | 8 | 19 | 16 |
| 3 | Fleyr | 10 | 8 | 2 | 26 | 13 | 13 | 16 |
| 4 | TB | 10 | 7 | 3 | 24 | 16 | 8 | 14 |
| 5 | ÍF | 10 | 4 | 6 | 17 | 20 | -3 | 8 |
| 6 | KÍF | 10 | 2 | 8 | 9 | 27 | -18 | 4 |
| 7 | Dráttur | 10 | 1 | 9 | 13 | 28 | -15 | 2 |
| 8 | Ternan | 10 | 1 | 9 | 7 | 28 | -21 | 2 |

# Stjørnan greiddi uppgávuna



*Savnsmynd*

**HONDBÓLTUR** Tað varð væntað, at Stjørnan skuldi renna næstbesta liðið hjá StÍF um koll, men gestirnir stóðu seg væl

Uni Holm Johannesen

Stjørnan hevur, sum væntað, kós í finaluna eftir fyrru hálvfinaluna í steypakappingini.

Á pappírinum var talan um eina lætta uppgávu, tá næstbesta liðið hjá StÍF, sum leyp hvøkk á og vann á besta kvinnuliðnum hjá felagnum í fjórðingsfinaluni, tóku móti verandi greipuvinnarunum í ítróttarhøllini á Skála í gjár.

StÍF hevði hinvegin nakrar spælarar við, sum hava spælt á besta liðnum hjá felagnum í hesum kappingarárinum, millum annað Rebekka Justinussen, Bára Bertelsen og Fríðrun Danielsen.

Men munurin varð ikki so stórur, sum tey flestu roknaðu við.

Heimaliðið vann 33-24.

Liðini togaðust fyrstu løtuna, men Stjørnan fór frá heimaliðnum so líðandi.

Seinna hálvfinalan verður spæld tann 1. februar í Klaksvík.

uni@sosialurin.fo

# Nicoleta hevur leikbann

**HONDBÓLTUR** Sosialurin skrivaði mikudagin, at Nicoleta Radu Hansen spælir ætlandi við Neistanum í seinnu hálvfinaluni. Tað er ikki rætt

Uni Holm Johannesen

Neistin skal standa seg fyrimyndarliga væl, um liðið skal vinna seg í steypafinaluna hjá kvinnum í ár. Neistin tapti fyrru hálvfinaluna við átta málum á heimavølli fyri Tjaldur.

Barbara Brauer og Nicoleta Radu Hansen, sum skifti til Neistan í síðstu viku, vóru ikki við hendan dagin. Sosialurin skrivaði mikudagin, at tað kom væl við til seinnu hálvfinalu, at tær verða helst tøkar.

Tað er ikki heilt rætt. Nicoleta Radu Hansen kann ikki spæla við í seinnu hálvfinaluni, tí hon hevur umboðað Stjørnuna í steypakappingini fyrr í kappingarárinum. Eingin spælari kann spæla við tveimum ymiskum feløgum í steypakappingini í sama kappingarári.

uni@sosialurin.fo

# Topp-skjúttin fer til Danmarkar

**FÓTBÓLTUR**
**Steffan Kalsø, sum var toppskjútti hjá klaksvíkingum í 2010, fer ikki at spæla við KÍ í ár**

Uni Holm Johannesen

Heimasíðan hjá KÍ skrivar, at hann fer til Danmarkar í lestrarørindum, og tí verður hann ikki partur av hópinum hjá uppflytarunum sum upprunaliga ætlað.

23 ára gamli Steffan Kalsø skeyt 16 mál í 26 landskappingardystum í fjør, sambært Faroesoccer.com.